# Valentinesdagur vindur upp á seg á Tvøroyri

**Dagurin í dag eitur Valentinus. Tað er dagurin tey flestu av okkum kenna frá amerikonskum filmum, har tey, ið eru góð, geva hvørjum øðrum kort og sjokolátur, og annars fjálga hvørt um annað. Á Tvøroyri er hetta við at vinda upp á seg, og fleiri í Suðuroy kunnu vænta sær blómur í dag og kanska eisini ein góðan døgurðabita**



*Í blómuhandlinum á Tvøroyri gera tey heilt fitt burturúr Valentinesdegnum*

## FAKTA UM VALENTINESDAG

Tað er rættiliga óvíst, hvar Valentinesdagur hevur sín uppruna, men mest sannlíkt er, at Valentinesdagur er nevndur eftir Sankta Valentinus. Hann var ein prestur í triðju øld í Rómverjaríkinum. Tá var Claudius annar keisari, og hann kravdi av sínum soldátum, at teir máttu verða stakir menn, tí hann metti, at stakir menn vóru betri soldátar enn giftir menn. Hetta fekk Valentinus prest at gifta soldátarnar í loyndum. Tá í Claudius keisari fann út av hesum, fongslaði hann Valentinus. Her hitti Valentinus prestur eina kvinnu, ið hann gjørdist góður við, og hann sendi tað fyrsta valentinekortið, ið hann undirskrivaði frá tínum Valentine.

VALENTINESDAGUR
*Eyðhild Jacobsen*
*eydhild@sosialurin.fo*

Í blómuhandlinum hjá Karl Øster á Tvøroyri rigga tey til Valentinesdag. Inni í hugnaliga handlinum angar av reyðum rósum og fleiri reyð hjørtu eru at síggja. Blómubindarin Súsanna í Toft stríðist við at gera eitt romantiskt horn, har tann, ið ynskir at gleða sín partnara, kann finna alskyns romantiskar lutir.

-Heilt fitt av fólki støkkur inn á gátt her, og menninir smæðast ikki burtur. Tað eru fleiri, ið koma at keypa til konurnar á Valentinesdegi. Tað eru serliga tær reyðu rósurnar, ið selja væl, sigur eigarin av blómuhandlinum, Anton Øster.

Kvinnurnar eru heldur ikki eiðasørar, og tær eru eisini raskar at velja okkurt til menninar burtur úr tí stóra úrvælinum í handlinum.

-Vit royna at gera rættiliga nógv burturúr; vit pakka blómurnar inn og pynta við hjørtum. Og vit hava leingi opið. Hetta haldi eg dáma bæði monnum og kvinnum væl, sigur Anton Øster.

### Vindur upp á seg

Valentinesdagur er eitt rættiliga nýtt fyribrigdi her í Føroyum, og tað er hann eisini í blómuhandlinum á Tvøroyri.

-Hetta er triðja árið, ið vit royna at gera okkurt serligt burturúr hesum degnum. Tað gekk eitt sindur strilti í fyrstani, men nú byrjar tilgongdin at venda. Tað er sum um, at vit føroyingar júst eru vorðnir tilvitaðir um, hvat Valentinesdagur er, sigur Anton Øster.

Tó er tað ein annar dagur, ið altíð er toppskorari hjá blómuhandlinum á Tvøroyri.

-Mammudagurin er avgjørt okkara besti dagur her í handlunum. Kanska verður tonkt meira upp á mammurnar enn upp á kvinnurnar, flennur Anton Øster.

### Romantiskan bita í Øravík

Sum nakað heilt nýtt fer Hotel Øravík eisini at gera eina serliga Valentinesmatskrá við onkrum lekrum búffi og einari romantiskari dessert. Tó vænta tey ikki, at hetta verður tað heilt stóra kvøldið.

-Matstovumentanin er ikki heilt tann sama her suðri sum eitt nú í Havn. Her eru fólk eitt sindur trekari, tá ið tað kemur til at fara út at eta. Tey eta heldur heima. Og so er Valentinesdagur eitt so nýtt fyribrigdi her í Føroyum, at tað kanska eru fleiri, ið ikki vita hvør dagurin er, sigur Uni Mortensen, stjóri á Hotel Øravík.

# Brandur Enni á veg til Hollywood

**Brandur Enni fer í apríl mánað til Hawaii, har hann skal práta við Real Eagle filmfelagið um møguleikan til at verða við í einum filmi. Um filmurin verður til nakað, so er fíggjarætlanin trígg-jar til fimmhundrað milliónir, kendi danin Viggo Mortensen kemur møguliga til at spæla høvuðsleiklutin, og helvtina av filminum verður møguliga upptikin í Føroyum**

FILMSÆTLAN
*Eyðhild Jacobsen*
*eydhild@sosialurin.fo*

Tað hevur verið heldur friðarligt seinastu tíðina rundan um unga tvøroyrardrongin Brandur Enni. Men nú eru stórtíðindi at frætta, tí í apríl mánað sleppur Brandur Enni til Hawaii, har hann kanska fær møguleikan til at verða við í einum stórum Hollywood filmi. Hetta er ein gomul ætlan, sum í fleiri ár hevur verið ávegis. Og Brandur hevur alla tíðina havt samband við fólkini aftanfyri filmin. At hann nú verður bjóðaður til Hawaii kann hava í sær, at nú verður kanska álvari í, at hann sleppur við í filmin.



*Brandur Enni verður í næstum møguliga at síggja ella at hoyra í einum stórum Hollywood filmi*

Savnsmynd

-Tá ið tað kemur til filmsheimin, so eru tingini rættiliga óítøkilig. Tað er langt frá hugskot til veruleika. Men tá ið ein verður bjóðaður yvir har sum tingini henda, so kann tað væl verða, at okkurt kemur burturúr, sigur Jógvan Eliasen, ið tekur sær av sølu og marknaðarføring hjá Brandi.

### Óvissur leiklutur

Um nú Brandur slapp við í filmin, so er tað enn rættiliga óvist, hvat fyri leiklut Brandur skal hava í filminum.

-Talan kann verða um ein filmsleiklut ella um ein sang til filmsfløguna. Líkamikið hvør møguligi leikluturin verður, so kann hetta lata heimsmarknaðin upp fyri Brandi, soleiðis at hann kann gera seg galdandi ikki bara her heima í Føroyum men eisini á heimsmarknaðinum, sigur Jógvan Eliasen.

Í løtuni gongur Brandur á tónleikaskúla í Svøríki, ein nýggj fløga er á veg, og myspace heimasíðan hjá Brandi er so væl umtókt, at eini 10.000 fólk hava longu verið og vitjað.

### Taka film upp í Føroyum

Tað er Bonnie Carrini, ið er havmyndakvinna, sum er komin við hugskotinum um filmin. Hon hevur verið og vitjað í Føroyum, og bleiv hugtikin av hvussu nógv Føroyar líktust Hawaii.

-Henni dámdi so væl líkheitina millum Hawaii og Føroyar, at hon fekk hugskotið um at gera ein film, har helvtin skal upptakast í Hawaii og helvtin í Føroyum. Møguliga verður víst, hvussu lívið er í Føroyum í mun til lívið í Hawaii. Hetta skal nokk krydrast við tí vanligu filmssøguni um kærleika og tað góða móti tí ónda. Eg haldi, at tey hava Viggo Mortensen í huga til ein av høvuðsleiklutunum, sigur Jógvan Eliasen.

# Kærleikskøka frá Grón

**Ì samband við Valentinesdagin í ár ger bakaríðið Grón reyðar hjartaformaðar kærleikskøkur. Tað eru serliga ungu menninir, ið koma inn at keypa**

VALENTINESDAGUR
*Eyðhild Jacobsen*
*eydhild@sosialurin*

Fyri fyrstu ferð nakrantíð fer bakaríðið Grón at gera nakað serligt burturúr Valentinesdegnum. Tey hava í hesum sambandi baka hjartaformaðar reyðar kærleikskøkur. Sveinur Thomasen, ið er ein av eigarunum í Grón, sigur, at tey fara at royna hetta, tí hetta er nakað, sum vindur alsamt meira upp á seg í Føroyum.

-Vit síggja, at fleiri og fleiri keypa hvørjum øðrum blómur henda dagin, so vit tonktu, at nú skuldu tey eisini fáa møguleikan at keypa hvørjum øðrum eina kærleikskøku, sigur Sveinur Thomasen.

### Ungir menn eru málbólkurin

Tað eru serliga teir ungu menninir, ið Grón hevði í huga, tá ið tey fóru undir at gera hesar køkurnar, og tað eru eisini teir, sum koma inn at keypa.

-Jú, teir hava bara verið raskir at keypa, so onkur kona kann vænta sær eina lekra køku seinni í dag, sigur Svein Thomasen.

Konurnar hinuvegin eru ikki so raskar at keypa.

-Nei, tær hava vit sæð færri av. Kanska baka tær sjálvar monnunum eina kaku, sigur Svein og flennur.

